NORÐOYA
BÚ- OG HEIMATÆNASTA

# Demensur

## - hvat so?





# Hvat er **demensur?**

**Demensur er felagsheiti fyri fleiri ymiskar heilasjúkur, sum hava við sær broytingar í gerandisdegnum, bæði hjá tí sjúka og teimum avvarðandi**

Sjúkugongdin er sera ymisk, men støðan broytist líðandi. Tí hava familjurnar aloftast tørv á støðugum stuðli til skiftandi avbjóðingar.

Hetta eru nøkur vanlig tekin til demens:

- Ofta versnar stutttíðarminnið
- Evnini at hugsavna seg vikna
- Evnini at finna veg vikna
- Evnini at málbera seg kunnu ávirkast
- Persónmenska, hýrur og atburður kunnu broytast

# Illgruni
# **um sjúku**

Tað er umráðandi at søkja sær hjálp í góðari tíð, tá ið ein hevur illgruna um demenssjúku, so viðgerð og stuðul kunnu skipast á bestan hátt. Um ein hevur havt eyðkenni, ið geva illgruna um demenssjúku, longri enn eitt hálvt ár, eigur ein at fara til kommunulækna, sum síðani ger ymiskar kanningar.

Endamálið við kanningunum er at staðfesta, um talan er um demenssjúku, ella um aðrar orsøkir kunnu vera til, at ein hevur eyðkenni, ið minna um demens.

Um hesar kanningar styrkja illgrunan, um at talan er um demenssjúku, verður ein vístur til Demensklinikkina á Landssjúkrahúsinum til nærri kanningar og sjúkuavgerð.



# Tá ið sjúkan **er staðfest**

Demensur er ein sjúka, sum tað ber til at liva leingi og væl við. Hóast hetta síggja vit ofta, at menniskju, ið hava fingið staðfest eina demenssjúku, taka seg burtur úr virkna gerandislívinum, tí tey óttast at møta øðrum, tá t.d. minnið er farið at bila.

Norðoya Bú- og Heimatænasta, NBH, hevur sett sær fyri, at Norðoyggjar skulu vera eitt gott stað at vera, hóast demenssjúku.

Eitt demensvinarligt samfelag er eyðkent við opinleika, stórari vitan um demens og lættariatgongd til stuðul, kunning, vegleiðing, ráðgeving og undirvísing um demens.

Tá ið ein hevur fingið staðfest eina demenssjúku, eru ofta nógvir spurningar hjá allari familjuni at taka støðu til, og tá er gott at hava onkran at venda sær til.

Í Norðoyggjum eru góðir møguleikar at fáa stuðul og vegleiðing frá demenssamskiparum á Dagtilhaldinum Búðatrøð, í Heimatænastuni, á Dagtilhaldinum á Viðareiði ella frá landsdemenssamskiparanum.





# Tænastur og tilboð

Menniskju við demenssjúkum siga, at hugburðurin og atferðin hjá fólki, tey møta í tí dagliga, ger størsta munin, hvørt eitt samfelag kann sigast at vera demensvinarligt ella ikki. Fólk kenna seg ofta hjálparleys og óttafull, tá ið tey møta menniskjum við demensi, tí teimum vantar vitan og innlit.

Í hesum sambandi eru tænasturnar frá bæði landsdemenssamskipara og NBH týðandi fyri at skapa størri vitan og tilvitan um, hvussu vit møta borgarum, sum hava fingið eina demenssjúku, og teirra familjum.

NBH veitir ymiskar tænastur og tilboð fyri at hjálpa fólkapensjónistum, ið hava fingið staðfest eina demenssjúku, at búleikast heima sum longst. Tætt samstarv er millum eindirnar í NBH og við Demensklinikkina á Landssjúkrahúsinum.

Starvsfólkini á Dagtilhaldinum Búðatrøð vilja eisini fegin koma út á skúlar og arbeiðspláss at greiða frá, hvussu vit best møta menniskjum, sum hava fingið demens, so tey framhaldandi kunnu vera virkin í samfelagnum og møguliga eisini á arbeiðsmarknaðinum.

## Landsdemenssamskipan

Demensklinikkin á Landssjúkrahúsinum hevur sett landsdemenssamskiparar í starv runt um í landinum. Ein er settur í Norðoyggjum.

Endamálið við landsdemenssamskipanini er, umframt at ráðgeva avvarðandi og starvsfólki við m.a. fyribyrgjandi kunning, at bjóða útgreinan fyri demens.

Fyrstu ferð ein kemur í samband við Demensklinikkina, má tað vera umvegis kommunulækna.

## Heimatænastan

Í Heimatænastuni hjá NBH eru tríggir sjúkra-røktarfrøðingar settir at hava ábyrgd av demenssamskipanini sum partur av teirra uppgávum sum heimasjúkrarøktarfrøðingar. Teir arbeiða uppsøkjandi og upplýsandi og kunnu vegleiða, ráðgeva og undirvísa, um ynski er um tað.

Til ber at koma í samband við Heimatænastuna á tel. 793480 gerandisdagar millum kl. 9.00-15.00.



## Dagtilhaldið **Sóljan**

Endamálið við dagtilhaldinum er at eggja borgarum at vera virknir í egnum lívi. Dentur verður lagdur á heilsumennandi og fyribyrgjandi virksemi.

Dagtilhaldið Sóljan er partvíst eitt visiterað tilboð og partvíst eitt opið tilboð, har allir fólkpensjónistar í Norðoyggjum kunnu koma.

Til ber at seta seg í samband við Dagtilhaldið Sóljuna á tel. 793455 mánadag, týsdag, hósdag og fríggjadag millum 10-15.

## Dagtilhaldið **Búðatrøð**

Búðatrøð er dagtilhald fyri heimabúgvandi borgarar í Norðoyggjum, sum hava fingið staðfest eina demenssjúku.

Endamálið er at stuðla borgarum til ein skipaðan, innihaldsríkan gerandisdag, ið er merktur av lívsgleði og trivnað, hóast sjúku. Somuleiðis við vegleiðing, ráðgeving og undirvísing stuðla familjunum, so tær gerast betur førar fyri at veita tann stuðul og ta hjálp, ið krevst at vera um ein avvarðandi, sum hevur fingið eina demenssjúku.

Til ber at seta seg í samband við Búðatrøð á tel. 793451 gerandisdagar millum kl. 9.00-15.00.



## Dagtilhaldið **á Viðareiði**

Endamálið við dagtilhaldinum á Viðareiði er at eggja borgarum at vera virknir í egnum lívi. Dentur verður lagdur á heilsumennandi og fyribyrgjandi virksemi.

Dagtilhaldið á Viðareiði er partvíst eitt visiterað tilboð til fólk, ið hava fingið staðfest eina demenssjúku, og partvíst eitt opið tilboð, har allir fólkpensjónistar í Norðoyggjum kunnu koma ávísar dagar.

Harafturat ber til hjá familjum, ið eru um ein avvarðandi, sum hevur fingið eina demenssjúku, at fáa vegleiðing og ráðgeving, so tær gerast betur førar fyri at veita tann stuðul og ta hjálp, ið krevst at vera avvarðandi.

Til ber at seta seg í samband við Dagtilhaldið á Viðareiði á tel. 793490, týsdagar og fríggjadagar millum kl. 10-15.

## Umlætting

Fólkapensjónistar í Norðoyggjum hava í stytri tíðarskeið møguleika fyri at koma til umlætting á einum av eindunum í NBH. Avgerðin um at játta umlætting tekur støði í eini fakligari meting.

Er tørvur á umlætting, ber til at venda sær til NBH á tel. 793400
mánadag til fríggjadag millum kl. 8.00 – 15.00
ella senda umsóknarblað, sum fæst á heimasíðu okkara www.nbh.fo



## Búpláss

Í NBH eru fimm heim, ið hýsa borgarum í Norðoyggjum, ið hava tørv á røkt og hjálp alt samdøgrið. Tvey av hesum eru serliga ætlað fólkum, ið hava fingið staðfest eina demenssjúku. Tó kemur meira enn so fyri, at fólk, ið hava fingið staðfest demenssjúku, búgva á øðrum heimum enn hesum. Føroysk gransking vísir, at uml. 66% av teimum, sum búgva á røktarheimum og sambýlum í Føroyum, hava fingið staðfest demenssjúku. Soleiðis er eisini í NBH.

Søkjast má um búpláss við at senda umsóknarblað. Til ber at venda sær til NBH á tel. 793400
mánadag til fríggjadag millum kl. 8.00 – 15.00
fyri at fáa umsóknarblað ella at finna tað á heimasíðu okkara www.nbh.fo

Tá ið eitt búpláss gerst tøkt, kemur upptøkunevndin saman at viðgera, hvør á bíðilistanum skal fáa bjóðað plássið. Fyrsta rætt til búpláss hevur tann borgarin, sum hevur størstan tørv á røkt ella hjálp alt samdøgrið.



# Nærri **kunning**

Nógv kunnandi tilfar finst um demens.
Her eru nakrar tilvísingar:

www.alzheimer.fo

www.alzheimer.dk

www.videnscenterfordemens.dk

www.sst.dk

www.nbh.fo

GRAFIA / ESTRA